## Skrivstovufólk

Av tí at umsitingarliga arbeiði á Royndarstøðini og Skógrøkt landsins nú verður lagt saman, verður við hesum søkt eftir einum starvsfólki at arbeiða uml. hálva tíð í nýggju eindini.

**Arbeiðið** kemur í høvuðsheitum at fevna um:
- arbeiði við roknskaparskjølum
- skriving av frágreiðingum
- journalisering og arkivering
- arbeiði verður sjálvstøðugt, við møguleika fyri fleksiblari arbeiðstíð

**Førleikakrøv:**
- góðan kunnleika til roknskapar- og bókhaldsarbeiði
- góðan kunnleika til føroyskt mál og rættskriving, umframt kunnleika í donskum og enskum
- góðan kunnleika til teldutøkt skrivstovuarbeiði
- góð samstarvsevni og helst royndir frá líknandi starvi

**Løn** sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Arbeiðsstaður:** meginpartin av tíðini hjá Skógrøkt landsins í Hoydølum og lutvís á Búnaðardeplinum í Kollafirði

**Setanarstaður:** viðkomandi verður settur í starv hjá Almennum royndum og ráðgeving (Royndarstøðini)

**Nærri upplýsingar um starvið** fáast við at venda sær til Peder Haahr tlf. 479000

**Umsókn:** skrivlig umsókn skal vera Royndarstøðini í hendi í seinasta lagi 29. apríl 2002

Skógrøkt landsins

**Royndarstøðin**
410 Kollafjørður

## Arbeiðseftirlitið
*Occupational Safty and Health Administration*

**Vegna farloyvi er eitt sera áhugavert og spennandi starv sum**

## eftirlitsfólk

**innan arbeiðsumhvørvi** og alt, ið hartil hoyrir, leyst at søkja, til setan 1. juni, ella sum skjótast. Starvið er tíðaravmarkað til 15. januar 2003.

**Arbeiðsuppgávurnar** eru sera fjølbroyttar og kemur viðkomandi, umframt vanligt eftirlitsvirksemi, eisini at taka sær av evni og tilfari og øllum inniklima mátingum og sundurgreiningum av hesum.

**Rætti umsøkjarin** við tøkniligum førleika, royndum innan evnafrøðiligar mátingar, við góðum evnum at málbera seg skrivliga á føroyskum og við teldukunnleika hevur fyrimun.

**Setanartreytir.** Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum landsstýrið og viðkomandi yrkisfelag.

**Upplýsing og umsókn.** Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Arbeiðseftirlitið, tlf. 317811 og tosa við Karl Joensen, stjóra. Skrivlig umsókn, við avriti av prógvi og møguligum ummælum skal, áðrenn 4. mai 2002, sendast til:

**Arbeiðseftirlitið**
Boks 1134
110 Tórshavn

## Kunngerð

**til løgtingsveljarar í Skála Kommunu til løgtingsvalið 30. apríl 2002**

**Brævatkvøður**
Veljarar í Skála Kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 29. apríl 2002.
Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 441179 í seinasta lagi 29. apríl 2002, kl. 15.00.

**Valkort**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til løgtingsvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá í seinasta lagi 29. apríl 2002 á tlf. 441179.

**Valstøð**
Løgtingsvalið fyri valstøðini í Skála Kommunu fer fram á hesum støðum:

**á Skála: í Pensiónistahúsinum**
**í Skálafirði: í skúlanum**

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Skála Kommuna**

## MASKINUR TIL SØLU !!

Dekkmaskina, Aquila AS 930, árg 1999
prísur: **20.000,-**
Avbalanseringsmaskina, Corghi EM-71
prísur: **10.000,-**
Kompressari, Ingersöll Rand
prísur: **5.000,-**
Píkamaskina, Winterbach, Oku-Automatik
prísur: **7.000,-**
2-soyla billyfta, I stobal (defekt)
prísur: **1.000,-**

**Einans kontant søla!!**
**Íroknað MVG !!**
***Ring á Tlf. 226750 og hoyr nærri***

## Súkkluvenjingar
**hjá Tórshavnar Súkklu Felag**

| | Børn og ung | Motións-súkkling | Royndir súkklarar |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 19.00-20.00 | 19.00-20.00 | |
| Mikudag | | | 19.00- 21.30 |
| Hósdag | 19.00-20.00 | | |
| Leygardag | | | 15.00-17.30 |

**Børn og ung** byrja hósdagin 2. mai, og halda fram til mánadagin 1. september.
*(Evald Rasmussen, tlf. 316552.)*
**Motiónssúkklarar** byrja mánadagin 22. apríl. Hetta eru tey, ið eiga eina súkklu, og sum fegin vilja røra seg á súkklu. Ikki er neyðugt at hava eina nýmótans kappkoyringarsúkklu, ein fjalla- og býarsúkkla, og ein joggingdrakt eru minst líka góð til hetta slag av súkkling.
*(Sverri Mohr Edvinson, tlf. 319659.)*

**Royndir súkklarar** byrja mánadagin 22. apríl. Hetta eru súkklarar, ið hava súkklað í fleiri ár.
*(Gunnar Dahl Olsen, tlf. 319030.)*

**Byrjað** verður hvørt kvøld frá Føroya Tele á Hálsi. Eru spurningar, ringi so endiliga.

**TSF**




## Hús í Fuglafirði

44 m² í trimum hæddum.
Á loftinum eru 4 kømur og w.c.
Í miðhæddini er køkur, stova, bað og durur.
Í kjallaranum er kjallararúm og sólcentur.
Til sølu um nóg høgt boð fæst.

**Tlf. 444844 aftaná kl. 18.00.**

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Danstein**
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820



# Vikuskifti

Nr. 75 • leygardagur • 20. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


Andar av tí ónda

siga prestarnir Niels Pauli Danielsen og Peter O.K. Olufson



Lesið s. 6 og 7



*Tey í Tilhaldinum syngja hvønn týsmorgun. Sangirnir eru føroyskir, og dámar teimum hetta ógvuliga væl*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Syng, syng, syng morgunsangin tín

Hvønn týsmorgun savnast tey í Tilhaldinum í Tórsgøtu í Havn til hugnasang. Byrjað verður klokkan 10, og sungið verður í umleið hálvan annan tíma

SANGUR
*Ingrid Bjarnastein*

*Havnin, áh Havnin, tann deiliga Havn,*
*Gott er at kenna tín fjálgandi favn,*
*... Havnin er heilag og sæl...*

Veðrið var gott henda týsmorgun Sosialurin var og vitjaði í Tilhaldinum í Tórsgøtu. Sangurin hoyrdist langt út í gongina, og inni í sjálvum hølunum stóðu eini 25-30 fólk savnað um eitt klaver, og sungið varð av lívsins kreftum.

– Vit syngja hvønn týsdag, sigur Katrin Samuelsen, sum er ein av songfuglunum, sum plagar at koma at syngja.

– Okkum dámar tað væl. Tað er stuttligt, og hugnaligt. Onkuntíð hava vit roynt at sungið fleirræddað, men tað riggar ikki altíð so væl.

So við og við meðan sangurin ljómar, koma fleiri og fleiri fólk. Onkur omma hevur eisini tikið ommubarnið við.

– Tað eru nakrir ymiskir sum spæla hvørja ferð. Jákup Lindenskov plagar at siga, hvat fyri sangir vit skulu syngja. Vit byrja vanliga um 10 tíðina, og so syngja vit í umleið hálvan annan tíma.

**Hugnaligt**

Tað er ikki sørt hugnaligt at sita í Tilhaldinum henda morgunin. Eins og áarstreymur rennur, Alt hann átti á fold og aðrir sangir, og øll syngja av hjartans kraft. Tey síggja ikki sørt nøgd út, sum um allir verðinstrupulleikar verða skúgvaðir til viks hesa løtuna sangurin heldur á. Í onkrum horni situr onkur og nýtur tónleikin, meðan bløðini verða lisin.

»Og so syngja vit nummar 309 í Føroya Fólks«, sigur Johan Restorff Jacobsen, sum saman við Benny Samuelsen syrgdi fyri, at húsakórið fekk klaverfylgispæl henda dagin.

Hølini fyllast meira og meira, og tá sangurin er liðugur sita tey og práta eina løtu.

– Vit byrjaðu uppá at hava sang fyri einum ári síðani, sigur Vanja Petersen, leiðari í Tilhaldinum.

– Vit syrgja fyri, at onkur altíð er, sum spælir klaver, meðan tey, sum koma, so sjálvi gera av, hvat verður sungið. Í fyrstuni høvdu vit bara sang einaferð um mánaðan, síðsta fríggjadag í mánaðanum, men tað hildu tey vera ov lítið, so nú hava vit valt at økja um sangin. Og tað dámar teimum væl. Fleiri eru, sum passa ommu- og abbabørn, og tey taka bara børnini við. Tað er ongin forðing.

Sangirnir, sum sungnir verða, eru føroyskir. Nógvir av teimum verða ikki sungnir so nógv. Eisini hevur Nancy Vesturbú, sum er 85 ár yrkt ein nýggjan sang, "Havnin, á Havnin". Vanja sigur, at tey, ið eru í Tilhaldinum eru ógvuliga kreativ, ikki bara hvat sangi viðvíkur.

Sangurin heldur áfram, meðan sólin skínur uttanfyri. Og meðan "Breið verndarveingir tínar" ljómar í bakgrundini, sníki eg meg útaftur í frísku várluftina – eina sanguppliving ríkari.